# Spania noyddist heim

**Eftir eitt sera spennandi endaumfar í bólki A, er tað nú greitt, at Spania noyðist at fara til hús, meðan portugisisku vertirnir framvegis eru við í kappingini, eftir at Portugal vann slagið um Iberisku hálvoynna sunnukvøldið**

BÓLKUR A
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Spanski liðskiparin, Raul, var ein ógvuliga vónbrotin maður sunnukvøldið, tá ið Spania noyddist at lúta fyri grannunum úr Portugal, sum harvið sendi Spania úr EM-endaspælinum*

Uppgávan hjá bæði Spania og Portugal var greið undan innanhýsis dystinum, tí vinnandi liðið var tryggjað luttøku í fjórðingsfinalunum. Møguleikin fyri at bæði liðini komu víðari var eisini til staðar, men tað kravdi, at grikkar taptu við tveimum málum, samstundis sum at Portugal vann.

### Heimaliðið trýsti ófført

Fyrsti hálvleikur av dystinum millum Portugal og Spania á Estadio Jose Alvalade í Lissabon var fyri tað mesta eitt stórt trýst á málið hjá Spania, og Real Madrid-málverjin, Iker Casillas, í spanska málinum hevði úr at gera. Serliga vóru tað teir báðir, Christiano Ronaldo úr Manchester United, ið hesaferð var við frá byrjan, og so veteranurin Luis Figo, ið gingu á odda. Einsamalli framherjin hjá Portugal, Pauletta, hevði tó ikki ein serliga hepnan dag, og tað var væl skiljandi, at hann bleiv skiftur út í steðginum til fyrimuns fyri Nuno Gomes. Hesin sami Nuno Gomes brúkti heldur ikki langa tíð um at gera vart við seg, tí longu tá ið tólv minuttir vóru leiktir av seinna hálvleiki. legði hann Portugal á odda, tá ið hann sendi bóltin framvið Casillas.

Spaniólar royndu alt tað, ið teir vóru mentir at fáa javnað, men hvørki Raul ella Fernando Torres úr Atletico Madrid, høvdu innstillað kanónina, og tað var undrunarvert, at tað gekk so long tíð, áðrenn Fernando Morientes var sendur á vøllin. Stóra trýstið hjá spaniólum gav einki úrslit, og heldur var tað í hinum endanum, at tað var nær við at mál kom. Millum annað hevði Costinha hjá Portugal eina risa møguleika stutt fyri leiklok, men fyri opnum máli stútaði hann upp um.

### Russar fingu stig

Í hinum dystinum í bólkinum hittust Russland og Grikkaland. Russarnir vóru longu útslignir, meðan grikkar vóru teir, ið høvdu besta møguleikan fyri at fara víðari í fjórðingsfinalurnar undan seinasta umfarinum. Russarnir góvu tó grikkum ein ordans hvøkk, tí tað gekk ikki meiri enn ein minuttir, so løgdu teir seg á odda við einum máli, sum Dmitrij Kirichenko skoraði. Grikska verjan var als ikki vakin fyrstu løtuna av dystinum, og tað gekk heldur ikki long tíð, so øktu russar um leiðsluna. Dimitry Bulykin slapp fullkomiliga ótarnaður at skalla bóltin í mál, og so var 2-0 til Russland, og grikkar vóru enn ikki komnir úr startholunum.

Áskoðararnir til dystin millum Russland og Grikkaland vóru vitnir til ein dyst, har ferðin var øgiliga, og bæði liðini satsaðu so at siga bara upp á álop, og málmøguleikarnir trutu ikki. Tað skal tó sigast, at áskoðararnir eisini fingu nógv dømir um, hvussu man misnýtir upplagdar málmøguleikar.

Grikkaland kom tó inn aftur í dystin stutt fyri hálvleik, tá ið Zisis Vryzas skoraði úr stuttari fjarstøðu, og tað var nóg mikið til, at grikkar komu í fjórðingsfinaluna, og tað var tað neyvan nakar, ið hevði gitt undan EM-endaspælinum.

### Enn eitt vónbrót fyri spaniólar

Tað tykist sum um, at tað er við at gerast ein siðvenja, at spanska landsliðið ikki megnar at liva upp til tað, ið fólk vænta av teimum, tá ið tað kemur til endaspøl. Seinastu mongu árini hevur spaniólar verið fastir fúsir til bæði HM- og EM-endaspøl, og ofta hava teir verið mettir millum favorittarnar til at vinna kappingarnar. Tað hevur tó aldrin gingið teimum eftir vild, og teir hava verið noyddir til at fara vónbrotnir heimaftur. Sagt verður mangan, at spanska kappingin er tann sterkasta í heiminum, og tískil áttu spaniólar at havt nógvar sterkar leikarar, men profilar so sum Raul, Fernando Morientes og Ruben Baraja hava als ikki víst, hvat teir kunna undir hesum EM-endaspælinum. Nú kunnu spaniólar so fara heim aftur og fara undir fyrireikingarnar til kvalifikatiónina til HM-endaspælið í 2006.

**Portugal-Spania 1-0 (0-0)**
1-0 Nuno Gomes

**Russland-Grikkaland 2-1 (2-1)**
1-0 Dmitrij Kirichenko
2-0 Dimitry Bulykin
2-1 Zisis Vryzas

# Flúgvandi kekkar

**Dysturin millum Holland og Kekkia leygarkvøldið man óivað verið besta dysturin higartil í EM-endaspælinum í Portugal. Hinvegin var hin dysturin í bólki B millum Týskland og Letland eitt satt vónbrot leikliga, men lettar vóru ovurfegnir, tí teir fingu javnleik, og tað var óvæntað**

BÓLKUR D
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Hóast týskarar á pappírinum høvdu ein lættan dyst móti, eydnaðist tað teimum ikki at fáa øll trý stigini. Hinvegin vístu kekkar, at teir hava eitt sera sterkt lið, tá ið teir komu frá at verða aftan fyri 0-2 upp á 3-2, sum eisini gjørdist endaliga úrslitið av dystinum móti Hollandi.

### Tamir týskarar

Fyrsti dysturin leygardagin var millum Týskland og Letland, og enn einaferð prógvaðu lettar, at teir eru ikki fyri ongum. Hóast týskarar høvdu bóltin nógv, so var tað ikki serliga ofta, at teir gjørdust veruliga vandamiklir. Bólturin bleiv sum oftast koyrdur runt á miðvøllinum, og tað var ikki ofta, at teir báðir áleypararnir, Fredi Bobic og Kevin Kuranyi, av álvara hóttu lettiska málið. Heldur komu hóttaninar av miðvøllinum, har eitt nú Michael Ballack royndi seg við nøkrum skotum.

Lettarnir vóru tó ikki heilt vandaleysir, og serliga tann lítli og kviki framherjin, Verpakovskis, gav týsku verjuleikarunum grá hár í høvdið. Fyrstu løtuna av dystinum royndi Týskland at trýsta, men lettar komu spakuligani inn í dystin, og fleiri ferðir lógu teir framvið. Størsta málmøguleikan í fyrra hálvleiki áttu lettar eisini, tá ið Verpakovskis stutt fyri hálvleik av miðjum vølli rann frá trimum verjuleikarum, men tá ið hann kom einsamallur við Oliver Kahn, var skotroyndin ikki nóg góð, og týski málverjin bjargaði lættliga.

Í hálvleikinum kom ungi Bayern München leikarin, Sebastian Schweinsteiger, á vøllin, og tað gav álopsspælinum hjá Týsklandi eitt sindur meira bit. Framvegis komu týskarar næstan ikki til opnar málmøguleikar, meðan Letland í hinum endanum helst bleiv snýtt fyri eitt brotsspark, tá ið Baumann feldi Verpakovskis.

Móti endanum av dystinum var talan fyri tað mesta um eitt langt týskt álop, men tað nærmasta týskarar komu einum máli, var tá ið innskifti Miroslav Klose í yvirtíðini skallaði framvið málinum.

Tá ið dómarin so stutt eftir bríkslaði fyri seinastu ferð, vóru tað nakrir ovurfegnir lettar, ið lupu um hálsin á hvørjum øðrum, tí teir høvdu ognað sær eitt stig í EM-endaspælinum, og tað eru tað ikki nógv, sum høvdu væntað.

### Hollendskt vónbrot

Tað vóru kekkarnir, ið byrjaðu best, tá ið dysturin millum Holland og Kekkia bleiv blástur íg gongd. Longu í fyrsta minutti var Koller nær við, men skotið hjá honum fór uppum. Ístaðin vóru tað hollendingarnir, sum løgdu seg á odda longu, tá ið fýra minuttir vóru leiktir. Arjen Robben sendi eitt fríspark úr høgru síðu væl innfyri, og við handaru stong var verjuleikarin, Bouma, klárur, og hann skallaði bóltin í mál til 1-0.

Hollendingarnir høvdu fleiri vandamiklar atsóknir á kekkiska málið næstu løtuna, og Clarence Seedorf var tvær ferðir nær við at økja um leiðsluna. Teir fingu tó eitt mál afturat stutt eftir, tá ið Ruud van Nistelroy fekk eina tvøravlevering frá Arjen Robben, og so var 2-0. Nú tóktist, sum um Holland hevði fult tamarhald, men so gjørdi liðskipari teirra, Philip Cocu, eitt mistak, sum loyvdi kekkum inn aftur í dystin. Cocu sendi eina avlevering beint í føturnar á Milan Baros, sum rann oman í hollendska brotsteigin, áðrenn hann serveraði bóltin fyri Jan Koller, sum skoraði til 1-2, sum eisini var hálvleiksstøðan.

Í seinna hálvleiki helt flótandi álopsspælið fram, og bæði liðini høvdu fleiri góðar møguleikar, men bæði Edwin van der Saar í hollendska málinum og Petr Cech í kekkiska málinum høvdu ein góðan dag.

Um miðjan seinna hálvleiki skifti Holland unga Arjen van Robben út, og setti Paul Bosvelt, ið er meiri verjukendur leikari, inn ístaðin. Hetta var rættuliga óvæntað, tí Robben hevði verið framúr góður, og hevði millum annað lagt upp til bæði hollendsku málini. Tað vísti seg eisini, at eftir hesa útskifting fingu kekkar størri og størri yvirvág. Tað gekk heldur ikki long tíð, so javnaðu kekkar. Pavel Nedved sendi innfyri, og Koller legði við bringuni bóltin fyri føturnar á Milan Baros, sum smekkaði bóltin í mál til 2-2.

Holland var nær við at leggja seg á odda aftur, men Cech bjargaði væl við beinunum, tá ið Andy van der Meyde royndi seg. Løtu seinni fekk Holland ein mann riknan av vølli, og tað bøtti ikki um umstøðurnar hjá teimum appelsinlittu. Tveir minuttir vóru eftir av vanligu leiktíðini, tá ið avgerðin fall. Karel Poborsky sendi ein bólt inn í hollendska brotsteigin, og nær málinum var Vladimir Smicer á rætta staðnum og skoraði sigursmálið, sum tryggjaði kekkunum fyrstaplássið í bólkinum og atgongumerki til fjórðingsfinalurnar.

**Týskland-Letland 0-0 (0-0)**

**Holland-Kekkia 2-3 (2-1)**
1-0 Bouma
2-0 Ruud van Nistelrooy
2-1 Jan Koller
2-2 Milan Baros
2-3 Vladimir Smicer



# Norðurlendsku londini á odda

**Í bólki C eru tað Danmark og Svøríki, sum eru á odda, áðrenn seinastu dystirnir í bólkinum verða leiktir í dag, og tá hittast júst hesi bæði lið**

EM-ENDASPÆL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Svenski landsliðsleikarin Zlatan Ibrahimovic fær við bakinum ímóti málinum sent bóltin í aftur um seg og í italska málið til 1-1 fimm minuttir fyri leiklok*

Eftir dystirnar í bólki C fríggjadagin eru tað Danmark og Svøríki, sum hava bestu kortini. Danmark vann sín dyst ímóti Bulgaria 2-0, meðan sviar fingu ein týðandi 1-1 javnleik móti Italia.

### Uppiborin danskur sigur

Danir sótu á øllum í fyrra hálvleiki av dystinum ímóti Bulgaria. Eyðkendi danski spælistílurin við skjótum uppspæli gjøgnum síðurnar, gav bulgarsku verjuleikarunum stórt høvuðbrýggj, men tað gjørdist tó sjáldan rættuliga vandamikið framman fyri bulgarska málið.

Tað eydnaðist tó danska liðnum at seta hol á, tá ið fyrri hálvleikur var nærum liðugur. Miðvallardynamoin, Thomas Gravesen, ið var við aftur á liðnum, sendi ein bólt inn um verjuna hjá Bulgaria til Martin Jørgensen, og Udineseleikarin var ósjálvsøkin og trillaði bóltin upp á tvørs til Jon Dahl Tomasson, ið bert skuldi seta innarsíðuna á, og so var 1-0.

Eftir steðgin løgdu danir seg nógv longur aftur á vøllin, og tað tókist ikki verða nøkur serliga skilagóð avgerð, tí hetta gav bulgarska liðnum yvirvág eina góða løtu, og fleiri ferðir leikaði á framman fyri málinum hjá Thomas Sørensen.

So hvørt sum seinni hálvleikur gekk, gjørdust leikararnir hjá Bulgaria meiri og meiri frustreraðir, og teir tiltuskaðu sær ein hóp av kortum. Móti endanum av dystinum fekk liðskipari teirra, Stilian Petrov úr Celtic, sítt næsta gula kort fyri at brúka seg móti dómaranum, og tað gav honum so eitt brúsubað fyri tíð. Danir slerdu sigurin fastan, tá ið farið var út um vanligu leiktíðina. Jesper Grønkjær, ið var komin á vøllin miðskeiðis í fyrra hálvleiki fyri ein meiddan Dennis Rommedahl, slapp inn um verjuna hjá Bulgaria, og hann sendi bóltin framvið bulgarska málverjanum, og so vann Danmark 2-0.

### Sviar vóru hepnir

Seinni dysturin fríggjakvøldið var uppgerðin millum Italia og Svøríki. Nógv rumbul hevði verið í italsku EM-leguni, bæði tí at stjørnuspælarin, Francesco Totti, hevði fingið leikbann í tríggjar dystir, men eisini tí at spælið í fyrsta dystinum móti Danmark ikki hevði verið nøktandi.

Italia byrjaði dystin sum eitt óløgi, og álopini skolaðu oman móti svenska málinum. Antonio Cassano avloysti Roma-liðfelagan, Totti, í italska álopinum, og hann legði eisini lið sítt á odda í fyrra hálvleiki, tá ið hann við høvdinum setti eitt innlegg frá Panucci í málið til 1-0 til Italia, eftir at svenska rangstøðufellan kiksaði.

Sviar høvdu ikki nógv at bjóða upp á í dystinum, hóast Arsenal-leikarin, Frederik Ljunberg, til tíðir vísti, hví so nógv evropeisk stórlið hava sýnt honum áhuga. Best leikari hjá svium í dystinum fríggjakvøldið var tó uttan iva málverjin, Andreas Isaksson, úr Djurgården, men sum í næstum fer at spæla fyri franska felagið Rennes. Isaksson hevði fleiri framúr góðar bjargingar, og serliga Christian Vieri man hava fingið marruna av svenska málverjanum.

Sum so nógv onnur lið ofta gera, gjørdu italiumenn tað mistak, at teir tóku seg longur aftur á vøllin miðskeiðis í seinna hálvleiki, og tað gjørdi, at sviar, sum annars ikki høvdu verið vandamiklir, bráddliga fingu fótin fyri seg. Brøndby-leikarin, Mattias Jonson, hevði eina naksa skotroynd, sum Gianluca Buffon í italska málinum bjargaði hegnisliga, men fimm minuttir fyri leiklok, fekk Svøríki javnað. Eftir eitt sindur av trunkaspæli framman fyri italska málið, endaði bólturin hjá Zlatan Ibrahimovic, og Ajax-framherjin sparkaði bóltin í einum boga aftur um seg, og hóast Christian Vieri royndi at verja fyri á sjálvari málstrikuni, so smeyg bólturin sær millum tvørstongina og høvdið á Vieri, og so var 1-1. Italiumenn kastaðu nú alt fram aftur, og í yvirtíðini var nær við, tá ið Christian Panucci við høvdinum sendi bóltin beint fram við málinum hjá Andreas Isaksson.

### Italia má vinna

Undan dystunum í dag hava Danmark og Svøríki fýra stig, Italia hevur tvey, meðan Bulgaria onki stig hevur. Um Italia yvirhøvur skal gera sær nakrar sum helst vónir um at koma í fjórðingsfinaluna, skulu teir vinna dystin móti Bulgaria, og samstundis noyðast teir at vóna, at Danmark og Svøríki ikki spæla javnleik 2-2, tí so koma tey bæði norðurlendsku londini víðari.

Í italsku fjølmiðlunum hava gitingar longu verið frammi um, at ein norðurlendsk samansvørjing verður gjørd, soleiðis at dysturin millum Danmark og Svøríki endar 2-2, og bæði liðini koma víðari. Hetta hava tó bæði danski venjarin, Morten Olsen, og annar av svensku venjarunum, Lars Lagerback, víst aftur, og Morten Olsen segði, at í einum EM-endaspæli fert tú altíð á vøllin fyri at vinna dystin.

**Danmark-Bulgaria 2-0 (1-0)**
1-0 Jon Dahl Tomasson
2-0 Jesper Grønkjær

**Italia-Svøríki 1-1 (1-0)**
1-0 Antonio Cassano
1-1 Zlatan Ibrahimovic

# EM-endaspælið í fótbólti

**Bólkur A**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Portugal | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 4 | 2 | 2 | 6 |
| 2 Grikkaland | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 4 | 4 | 0 | 4 |
| 3 Spania | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 2 | 2 | 0 | 4 |
| 4 Russland | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 2 | 4 | -2 | 3 |

**Bólkur B**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Frakland | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 4 | 3 | 1 | 4 |
| 2 Ongland | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 4 | 2 | 2 | 3 |
| 3 Kroatia | 2 | 0 | - | 2 | - | 0 | 2 | 2 | 0 | 2 |
| 4 Sveis | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 0 | 3 | -3 | 1 |

**Bólkur C**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Svøríki | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 6 | 1 | 5 | 4 |
| 2 Danmark | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 2 | 0 | 2 | 4 |
| 3 Italia | 2 | 0 | - | 2 | - | 0 | 1 | 1 | 0 | 2 |
| 4 Bulgaria | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 0 | 7 | -7 | 0 |

**Bólkur D**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kekkia | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 5 | 3 | 2 | 6 |
| 2 Týskland | 2 | 0 | - | 2 | - | 0 | 1 | 1 | 0 | 2 |
| 3 Holland | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 3 | 4 | -1 | 1 |
| 4 Letland | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 1 | 2 | -1 | 1 |